# TB og AB berjast um gullið

**B71 misti týðandi fet, tá teir á heimavølli leiktu javnt móti FS Vágum**

2. DEILD

*Jákup Mørk*

Alt bendir á, at oddastríðið í aðru deild fer at standa millum TB og AB. Bæði vunnu tey á útivølli um vikuskiftið, og serliga hjá AB mundi talan vera um sera kærkomin stig í truplum útidystin.

Líkt var annars leingi til, at talan skuldi gerast um javnleik í Hvalba. Nýggi AB-leikarin, Nikolaj Lindholm Eriksen hevði annrs lagt AB á odda, og argjamenn høvdu enntá brent brotsspark fyri steðgin, men í seinna hálvleiki javnaði Erik Hammer fyri vertirnar.

Hetta helt sær fram til seinastu tíggju minuttirnar, tá Bjarni Jørgensen í tveimum førum var maðurin aftan fyri AB-skoringar. Fyrst legði hann upp til Pætur Dam Jacobsen, og at enda slapp Nikolaj L. Eriksen enn einaferð á talvuna.

TB hevði ikki á pappírinum eins trupla uppgávu, men tað stóð kortini nógv á, tá teir vitjaðu í Klaksvik. KÍ tóktist tó at ætla at byrja føðignardagshaldið longu leygardagin, og allan dystin á tamb trýstu teir TB. Millum annað mátti stólpin tvær ferðirnar bjarga TB. Einum oddaliði so líkt, so megnaði TB tó at enda at greiða sína skyld móti dystarenda, tá Hallur Christiansen kundi skora einsamalla málið í dystinum, sum altso heldur TB uppi á oddasessinum í deildini.

Sandoyingar eru triðja liðið í oddastríðnum, men teir snávaðu, tá teir á heimavølli leiktu móti FS Vágum. Bergleif Sólsker hevði annars lagt heimaliðið framum, og alt bendi á, at talan skuldi gerast um enn trý stig til kontina.

Men í seinastu minuttunum datt sigurin burtur, tá Sonni Johansen javnaði fyri Vágamenn, og harvið tók tvey sera týðandi stig frá B71.

Í Havn var Sumba á vitjan, og heldur ikki hesaferð eydnaðist B36 at fáa nakað burturúr dystinumk. Sumbingar komu á odda 2-0 við málum frá Bergur Djurhuus og Kenneth Kjærbo, og tó at Jóannes Jakobsen javnaði móti dystarenda, so broytti hetta ikki um stigabýtið í dystinum.

Seinasti dysturin var í Vági, har LÍF fekk triðja sigurin upp í slag. Hesaferð gjørdist talan tó ikki um eins trygg tøl, sum tað hevur verið tey bæði seinastu umførini, men leirvíkingarnir staðfestu undir øllum umstøðum, at teir hava eitt lið, sum helst er alt ov gott til at liggja undir niðurflytingarstrikuni.

So er spurningurin, um LÍF megnar at halda fastu um positivu taktirnar, tá B71 kemur á vitjan komandi vikuskifti. Her hava sandoyingarnir í øllum førum ikki ráð at missa stig, um teir skulu gera seg galdandi í oddinum. Eisini TB hevur trupla uppgávu, tá teir skulu hitta sumbingar á útivølli, meðan AB tykist fáa tað nakað léttari á heimavølli móti VB. Hinir báðir dystirnir næsta vikuskifti eru FSV-B36 og Royn-KÍ.



*Sumba var á vitjan í Havn, og heldur ikki hesaferð eydnaðist B36 at fáa úrtøku úr dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Dystir

**B36-Sumba 1-2 (0-1)**
0-1: Bergur Djurhuus
0-2: Kenneth Kjærbo
1-2: Jóannes Jakobsen

**VB-LÍF 1-2 (1-2)**
0-1: Petur Sjúrðarberg
0-2: Sigríður Olsen
1-2: Birgir Jørgensen

**Royn-AB 1-3 (0-1)**
0-1: Nikolaj Lindholm Eriksen
1-1: Erik Hammer
1-2: Pætur Dam Jacobsen
1-3: Nikolaj Lindholm Eriksen

**B71-FSV 1-1 (1-0)**
1-0: Bergleif Sólsker
1-1: Sonni Johansen

**KÍ-TB 0-1 (0-0)**
0-1: Hallur Christiansen

## Máltindurin

adidas

| | | |
|---|---|---|
| Rógvi Jacobsen | HB | 10 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 9 |
| Súni Olsen | GÍ | 9 |
| Bogi Gregersen | Skála | 8 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 8 |
| John Petersen | B36 | 7 |
| Heine Fernandez | HB | 7 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 6 |
| Jacob Bymar | KÍ | 6 |
| Rúni Nolsøe | HB | 5 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 5 |
| Erling Fles | KÍ | 5 |
| Egil á Bø | B36 | 4 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 4 |
| Mindaugas | VB | 4 |

**1. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 13 | 10 - 2 - 1 | 35 | 12 | 23 | 32 |
| 2 Skála | 13 | 8 - 2 - 3 | 28 | 16 | 12 | 26 |
| 3 B36 | 13 | 7 - 3 - 3 | 24 | 15 | 9 | 24 |
| 4 GÍ | 13 | 6 - 2 - 5 | 23 | 24 | -1 | 20 |
| 5 VB | 13 | 5 - 4 - 4 | 18 | 15 | 3 | 19 |
| 6 NSÍ | 13 | 5 - 3 - 5 | 22 | 18 | 4 | 18 |
| 7 EB/Streymur | 13 | 5 - 2 - 6 | 22 | 20 | 2 | 17 |
| 8 KÍ | 13 | 3 - 7 - 3 | 18 | 18 | 0 | 16 |
| 9 ÍF | 13 | 2 - 1 - 10 | 19 | 43 | -24 | 7 |
| 10 B68 | 13 | 0 - 2 - 11 | 10 | 38 | -28 | 2 |

**2. deild menn**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 TB | 12 | 9 - 0 - 3 | 34 | 15 | 19 | 27 |
| 2 AB | 12 | 8 - 2 - 2 | 21 | 14 | 7 | 26 |
| 3 B71 | 12 | 7 - 2 - 3 | 34 | 25 | 9 | 23 |
| 4 FSV | 12 | 5 - 3 - 4 | 40 | 23 | 17 | 18 |
| 5 Royn | 12 | 6 - 0 - 6 | 27 | 28 | -1 | 18 |
| 6 Sumba | 12 | 5 - 3 - 4 | 19 | 21 | -2 | 18 |
| 7 LÍF | 12 | 4 - 3 - 5 | 20 | 25 | -5 | 15 |
| 8 B36 | 12 | 3 - 2 - 7 | 16 | 34 | -18 | 11 |
| 9 KÍ | 12 | 2 - 3 - 7 | 21 | 27 | -6 | 9 |
| 10 VB | 12 | 0 - 4 - 8 | 10 | 30 | -20 | 4 |




**Heimarøktin øki 3, Eysturoy**

## Røktarstarvsfólk

Í sambandi við umleggingar av arbeiðsgongdini í økinum, nú tvey nýggj eldrasambýli opna 1. sept. ávikavist í Leirvík og á Toftum, tørvar okkum nøkur røktarstarvsfólk afturat at seta skjótast til ber.

Talan er um arbeiði í skiftandi vaktum bæði inni á sambýlunum og úti í heimarøktini.

Vit sóknast eftir:
**Heilsuhjálpara, heilsurøktara, sjúkrarøktarfrøðingi,** sum

- hevur royndir innan heimarøkt
- hevur hug og hegni at vera við til at menna skipanina, sum er í støðugari broyting
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt við ábyrgd
- dugir at samskifta og hevur góð samstarvsevni
- er før/ur fyri at arbeiða undir skiftandi umstøðum

Vit bjóða:
- eitt spennandi arbeiðspláss við nógvum røktarfakligum uppgávum
- eitt starv, har tú kanst hava ávirkan og soleiðis verða við at menna heimarøktina

Harumframt verður søkt eftir:

**Sjúkrarøktarfrøðingi** - farloyvisstarv

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi at arbeiða í náttarvakt aðru hvørja viku í tíðarskeiðnum 01.10.04 - 30.06.05.

Arbeiðsøkið er alt øki 3, sum er allar kommunur í Eysturoynni uttan Eiðis- og Sunda kommuna.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita við at ringja til økisskrivstovuna í Runavík tlf. 449249.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Heimarøktin**
Heilsumiðstøðin
Postsmoga 47
620 Runavík

**Umsóknarfreist:** 15.09.04


## Suðuroyar Sparikassi

Postboks 2 · FO-900 Vágur · Faroe Islands
Tlf. (+298) 373064 · Fax (+298) 373640

### Roknskapur fyri 1. hálvár 2004

| 1.000 kr. | 2003 | 2004 |
|---|---|---|
| Rentuinntøkur | 9.970 | 8.564 |
| Rentuútreiðslur | 3.038 | 2.132 |
| **Rentuinntøkur netto** | **6.932** | **6.432** |
| Vinningsbýti av partabrøvum | 71 | 222 |
| Kostnaður, provisjónir v.m. | 1.157 | 1.190 |
| **Rentu- og kostnaðar inntøkur netto** | **8.160** | **7.844** |
| Virðisjavnan av virðisbrøvum gjaldoyra | -319 | 68 |
| Aðrar inntøkur | 9 | 9 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **7.850** | **7.921** |
| Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 6.084 | 6.232 |
| Avskrivingar av ognum | 170 | 77 |
| Aðrar rakstrarútreiðslur | 0 | 0 |
| Avskrivingar og burturleggingar av skuldarum (netto) | -430 | -2 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **2.026** | **1.614** |
| Skattur | 409 | 279 |
| **Úrslit** | **1.617** | **1.335** |

### Fíggjarstøða pr. 30. juni 2004

| | 2003 | 2004 |
|---|---|---|
| **Ogn** | | |
| Kassapeningur og innistandandi í tjóðbankum | 7.677 | 18.220 |
| Ogn hjá fíggjarstovnum | 19.624 | 26.560 |
| Útlán | 248.684 | 267.578 |
| Lánsbrøv | 61.939 | 46.782 |
| Partabrøv | 498 | 4.576 |
| Kapitalpartar í associeraðum felag | 0 | 1.850 |
| Ítøkiligar ognir | 3.707 | 3.059 |
| Aðrar ognir | 0 | 0 |
| Tíðaravmarkingar | 159 | 170 |
| **Ogn tilsamans** | **342.288** | **368.795** |
| **Skuld** | | |
| Skuld til fíggjarstovnar | 2.011 | 169 |
| Innlán | 297.736 | 321.254 |
| Onnur skuld | 2.820 | 1.913 |
| Tíðaravmarkingar | 0 | 0 |
| Eftirsett kapitalinnskot | 0 | 4.000 |
| Úrslit higartil í ár | 1.617 | 1.335 |
| Eginogn | 38.104 | 40.124 |
| **Skuld tilsamans** | **342.288** | **368.795** |
| **Tøl, ið ikki eru við í fíggjarstøðuni** | | |
| Ábyrgdir | 3.297 | 4.969 |





**Sálarfrøðistovan**
Hoyvíksvegur 65
Postboks 3134 · 110 Tórshavn

Bílegging av viðtalu
kl. 8.00 - 9.30
gerandisdagar
á tel 310335

**Kári Leivsson**
Autoriseraður sálarfrøðingur
- umfataður av sjúkrakassasáttmála

**Sosialurin**
Lesið Sosialin - tað loysir seg